# MASKINMEISTARIN

Nr. 4 / Mars 2018






Maskinstjóri á Christiani í Grótinum við Logos Hope



Vinnuháskúlin skal útbyggjast



11 maskinmeistarar fingu prógv

## Maskinmeistarafelagið fær nýggjan formann

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**Blaðnevnd**
Páll Hansen, ábyrgd
Jóan Petur Patursson

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Tel 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Blaðhald**
Tey, sum ynskja at halda MASKIN-MEISTARAN, kunnu boða frá hesum í teldupost til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,– kr. um árið; t.e fyri 4 bløð

**Endurgeving**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MASKINMEISTARANUM, tá keldan verður upplýst. MASKINMEISTARIN kann heintast í PDF á heimasíðuni hjá felagnum: www.mf.fo

**Forsíðumyndir**
*Ólavur Gunnarsson:*
Fotostudio/Finnur Justinussen
*Logos Hope:*
Myndaánari: Esmar Müller
*Vinnuháskúlin:*
Grækaris D. Magnussen
*Prógvhandan:*
Erland Hentze Rasmussen

**Umsiting og redaksjón**
Press: press@press.fo
Øssur Winthereig
ossur@press.fo
Tel 21 84 86
Ingolf S. Olsen
ingolf@press.fo
Tel 22 50 77
Grækaris Djurhuus Magnussen
grakaris@press.fo
Tel 51 44 44

**Umbróting, prent og liðugtgerð**
Estra 478500

Upplag: 800

# INNIHALD

Vinnuháskúlin skal útbyggjast ........ 5
Føroya Maskinskúli stovnaður í 1965 ........ 10
Maskinmeistarafelagið fegnast ........ 11
Ein spennandi lívsleið ........ 12
Nýggi formaðurin: Vit skulu vera meira sjónlig ........ 15
11 maskinmeistarar fingu prógv ........ 18
Maskinstjóri á Christiani í Grótinum við Logos Hope ........ 21
Um M/V Logos Hope ........ 26
Tríggir hava higartil boðið seg fram sum nevndarlimir ........ 28
Jóan Petur Patursson takkar fyr seg ........ 29
Føðingardagar ........ 30
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum ........ 31










# Takk fyri 11 góð ár

Ein nýggj tíð liggur fyri framman hjá Maskinmeistarafelagnum, nú vaktarskifti er í maskinrúminum. Á aðalfundinum tekur Ólavur Gunnarsson við sum nýggjur formaður, og við hesum fari eg at ynskja honum vælkomnum og bestu eydnu í sessinum og samstundis takka fyri meg og fyri 11 góð formansár.

Samanumtikið kann eg siga, at tað hevur gingið væl hjá felagnum hesi 11 árini. Fyri tað mesta hevur virksemið eisini gingið ómakaleyst og smidliga. Tó við einum lítlum undantaki mítt seinasta heila formansár, 2017. Tá breyt stundum í bæði borð orsakað av nógv umstríddu fiskivinnunýskipanini.

Men tað vil so vera. Tá stórar broytingar, onkur vil kanska kalla tað byltingar, eru í samfelagnum, eigur tað sjálvsagt eisini at merkjast í einum fakfelag, hvørs limir verða beinleiðis ávirkaðir av broytingunum.

Hóast orrusturnar og nógva gangin í almenna rúminum, sum var í fjør, so kann eg tó staðfesta, at tað síðani hevur verið merkiliga friðarligt. Heimurin gekk kortini ikki undir 1. januar í ár, og tað kunnu vit so øll bara frøast um.

Fiskivinnunýskipanina kundu vit hava nógvar og ymiskar meiningar um, men tað var sera avmarkað, hvussu nógv vit kundu ávirka innihaldið í henni.

Tað kunnu vit hinvegin, tá talan er um okkara sáttmálar, og tí pínir tað meg ikki sørt, at eg í so máta ikki kann handa komandi formanninum eitt slætt borð.

Sáttmálin við Føroya Reiðarafelag er tíbetur longdur til 1. apríl næsta ár, men sáttmálarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum gingu út 1. oktober, og sjálvsagt skuldu nýggir sáttmálar langt síðani verið komnir undir land har.

Soleiðis er ikki, men í nevndini mugu vit bara staðfesta, at okkara sáttmálar standa aftarlaga í røðini hjá Lønardeildini hjá Fíggjarmálaráðnum, og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið bíðar bara eftir, hvat Lønardeildin ger.

Vit vita væl, at Lønardeildin hevur nógvar sáttmálar at samráðast um, og at orkan er avmarkað. Men fyri fakfelagslimir og fyri alt samfelagið er tað als ikki nøktandi, at tað skulu ganga hálv og heil ár, áðrenn arbeiðsgevaraparturin hevur tíð til so mikið sum at setast við samráðingarborðið.

Fari at ynskja Ólavi Gunnarsson og nevndini annars hepna hond við samráðingunum, tá tær einaferð sleppa í gongd.



**Páll Hansen**
*– formaður í Maskinmeistarafelagnum*



SKEIÐ Á VINNUHÁSKÚLANUM

VINNUHÁSKÚLIN

- BRM-skeið
- ERM-skeið
- Ship Handling
- Skeið í heilsulæru og endurnýggjan
- ARPA-skeið
- ECDIS-skeið
- Tecdis-skeið
- SSO-skeið
- § 16-skeið
- ISPS-skeið
- Endurnýggjan av vinnubrøvum
- Tankers Safety-skeið
- Flutningur av vandamiklum farmi
- Ketilpassaraskeið
- GMDSS-skeið
- LRC-skeið
- GOC-skeið og endurnýggjan
- DP Basic/induction
- DP Advanced/Simulator
- DP endurnýggjan
- AIS
- Tankers familiarisation
- Háspenningsskeið maskinmeistarar
- Háspenningsskeið maskinistar

TRYGDARDEPILIN VIÐ ÁIR

- Eldsløkking umborð á skipi
- Endurtøkuskeið eldsløkking u.s.
- Sløkkileiðsla umborð á skipi
- Eldsløkking fyri skipsyvirmenn
- Endurtøka IMO 80
- Trygdarskeið grundleggjandi
- Trygdarskeið fult
- FRC-grundskeið
- Bátaføraraskeið
- Medisinsk fyrstahjálp
- Stroppaskeið

Skeiðini eru sambært STCW-sáttmálanum við broytingum frá 2010.
Koturnar til skeiðini finnast á heimasíðu skúlans.

Vinnuháskúlin · Boks 104 · 110 Tórshavn
Tel 350 250 · info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING






*Wilhelm Petersen, stjóri á Vinnuháskúlanum, við modelli av uppskoti til nýggjan Vinnuháskúla*

# Vinnuháskúlin skal útbyggjast

*Gongur tað sum leiðslan á Vinnuháskúlanum ætlar, so verður Vinnuháskúlin útbygdur við 1200 ferðmetrum. Tað merkir, at maskindeildin flytir úr hølunum við Krákugjógv oman í Vinnuháskúlan*

**TEKSTUR & MYNDIR:**
GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN – PRESS

Í løtuni bendir alt á, at Vinnuháskúlin verður útbygdur, soleiðis at maskinútbúgvingarnar eisini koma at vera á Vinnuháskúlanum í Nóatúni. Maskinútbúgvingarnar flyta sostatt úr skúlanum við Krákugjógv við Oyggjarvegin í Havn.

Wilhelm Petersen, stjóri á Vinnuháskúlanum, váttar fyri *Maskinmeistaranum*, at arbeitt varð í alt fjør, altso í 2017, við ætlanini. Mentamálaráðið gav grønt ljós at byrja fyrireikingarnar, og so varð farið í gongd. Landsverk hevur verið við í tilgongdini við sjálvari byggiskránni.

– Vit hóvdu vikuligar fundir við Landsverk stóran part av 2017. Her tosaðu vit aftur og fram um, hvat skuldi standa í byggiskránni, tí byggiskráin skal millum annað siga nakað um, hvør tørvur er á útbúnaði og vídd til starvsstovur, maskinrúm, simulator, flokshøli og so framvegis, sigur Wilhelm Petersen.



*Uppskot við „trappubygningi“ – sæð niðan á Vinnuskúlan. Uppskot: Zeta Arkitektar*



*Uppskot, har bygt verður í sama sniði, sum skúlin hevur frammanundan. Uppskot: Zeta Arkitektar*

## Ósambæriligt

Wilhelm Petersen heldur tað ikki vera serliga sambæriligt við tíðarinnar krøv og rakstur av skúlanum, at hann framhaldandi koyrir í tveimum.

– Tað er ikki gott, at skúlin er í tveimum, tað er irrasjonelt bæði fíggjarliga og á annan hátt. Nakrir lærarar ganga uppi við Krákugjógv, aðrir her í Nóatúni, nakrir næmingar við Krákugjógv og nakrir næmingar her, tað er ikki optimalt, heldur Wilhelm Petersen.

Hann sigur, at skalt tú hava eitt gott lestrarumhvørvi, so er neyðugt at skúlin, altso næmingar, lærarar og onnur starvsfólk, eru savnað á einum og sama stað.

Í fleiri lærugreinum er samlestur, tað er, at bæði maskinmeistarar og navigatørar fáa frálæru í somu lærugreinum, tað kann til dømis vera støddfrøði, búskapur og leiðsla. Samlesturin kann gagnnýtast betur, um allir næmingar eru á sama stað. Stjórin heldur eisini, at tað gevur skúlanum nakað eyka, at hann verður størri, altso fleiri næmingar – skúlin fær tá eina størri „volumu“.



*Framhald á næstu síðu >>*



*Vinnuháskúlin avmyndaður úr Nóatúni. Verður útbygt, so verður eisini bøtt munandi um parkeringsviðurskiftini.*

Í løtuni ganga knappliga 250 næmingar á Vinnuháskúlanum tilsamans.

## Simulatorar flytast

Verður skúlin útbygdur, verður eisini neyðugt at flyta ymiskt oman úr maskinskúlanum við Krákugjógv. Har eru simulatorar og starvsstovur og annað, sum má flytast oman í Nóatún, men pláss er ikki fyri tí í Nóatúni sum er.

– Hesin skúlin, sum sjómansskúlanæmingarnir ganga í, er ein góður skúli, men her er bara ikki pláss fyri næmingum og útgerð frá maskinskúlanum. Vit hava tørv á umleið 1200 ferðmetrum, og uppskotini, sum higartil er komin á tekniborðið, liggja øll um 1200 fermetrar, sigur Wilhelm Petersen.

Skúlin við Krákugjógv er eisini í góðum standi, men trupulleikin er, at Vinnuháskúlin í løtuni er tvíbýttur, og tað gevur nógvar avmarkingar.

– Tað skapar ónøgd og frustrasjón, tá tað skal ferðast so nógv ímillum skúlarnar, sigur Wilhelm Petersen.

## 30 milliónir krónur

Enn er ongin neyv kostnaðarmeting gjørd, men verður roknað við ferðmetraprísinum, sum nýttur verður til slíkt byggivirksemi, kemur kostnaðurin upp á umleið 25 milliónir krónur. Tá verður roknað við einum ferðmetraprísi uppá 21.000 krónur. Her verður talan um eitt sindur serligt byggjarí, og tí verður roknað við, at kostnaðurin fer at liggja um einar 30 milliónir krónur.

– Tá skulu vit hava í huga, at vit onki gjalda fyri lendið, tí tað eiga vit frammanundan. Haraftrat er ikki talan um stórt øki, sum skal gerast byggibúgvið, tí stórur partur av økinum er longu byggibúgvið, sigur stjórin á Vinnuháskúlanum.

## Gevur fleiri møguleikar

Wilhelm Petersen sær nógvar møguleikar, sum ein útbygging fer at hava við sær.

– Nýggi og útbygdi Vinnuháskúlin skal snøgt sagt vera „state-of-the-art“, sigur hann.

> ”– Nýggi og útbygdi Vinnu-háskúlin skal snøgt sagt vera „state-of-the-art“, sigur Wilhelm Petersen.“

Í tí liggur, at skúlin skal vera millum allarfremstu sjómans– og maskinskúlarnar um okkara leiðir. Skúlin skal hava nýggjastu tøknina og á allan hátt bestu frálæruna og umstøðurnar, soleiðis at føroyskir maskinmenn og navigatørar eisini í framtíðini skulu vera millum heimsins bestu og fremstu.

– Við útbyggingini fáa vit møguleika at gjøgnumganga allar maskinur, starvsstovur, simulatorar og so framvegis. Vit hava longu nú nógva útgerð, sum er rættiliga nútímans og framkomin. Okkurt er kortini, sum treingir til at vera ajourført, til dømis hevur el-starvsstovan nakað av gamlari útgerð, og við útbyggingini fáa vit møguleika at nútímansgera sovorðið, og tað er ambisjónin, sigur Wilhelm Petersen.

Hann vísir á, at útbyggingin eisini fer at tryggja teimum, sum koma inn á eftirútbúgvingarskeið, bestu umstøður og møguleikar.

– Tað verður ein skúli, sum gevur øllum eitt nógv betri umhvørvi, eisini betri lestrarumhvørvi, heldur Wilhelm Petersen.

## Søkja grunnar

Tá ið tað snýr seg um at endurnýggja ymiska tøkniliga útgerð á skúlanum, eru møguleikar at søkja ymsar grunnar í Evropa – kanska serliga í grannalondunum. Teir møguleikarnar fer leiðslan á Vinnuháskúlanum eisini at royna.

– Tað finnast maritimir grunnar, sum hava stóran áhuga í, at sjómansskúlarnir eru góðir, og her liggur Vinnuháskúlin líka væl fyri sum danskir sjómansskúlar. Nógvir næmingar fara jú út av Vinnuháskúlanum beint í altjóða vinnu, og tað kann so vera eitt slag av afturbering frá vinnuni til skúlarnar at halda teir í so góðum standi sum til ber, sigur Wilhelm Petersen.

Í samandi við nútímansgerð av maskinsimulatorinum fekk Vinnuháskúlin stuðul frá Statoil fyri nøkrum árum síðani. Tann stuðulin var uppá 1,4 milliónir krónur. Tað var ein góður stuðul hjá Vinnuháskúlanum at fáa. Samstundis gav tað maskinmeistaranæmingum nýggjar og betri møguleikar, sum at enda kundu veita millum annað Statoil upp aftur betri maskinmeistarar beinleiðis út av Vinnuháskúlanum.

## Løgdu saman í 2005

Tá landsstýrið í 2004 boðaði frá, at Maskinskúlin og Føroya Sjómansskúli skuldu leggjast saman um árskiftið 2004/2005, var møguleikin at leggja saman í ein og sama skúlabygning eisini uppi at venda, men tað varð av ongum tá. Gongdin hesi árini síðan samanleggingina hevur ikki verið uttan trupulleikar, og tí vónar stjórin á Vinnuháskúlanum, at ætlanin at byggja upp í verandi skúla í Nóatúni byrjar sum skjótast.

– Fyri okkum hevur tað týdning, at allir partar taka undir við ætlanini. Á skúlunum báðum eru lærarar og starvsfólk rættiliga jalig, somu ábendingina hava vit fingið úr Mentamálaráðnum. Maskinmeistarafelagið heldur hetta eisini vera gott, sigur stjórin á Vinnuháskúlanum, Wilhelm Petersen.

Stjórin á Vinnuháskúlanum sigur, at gongur alt sum ætlað, so kann arbeiðið at útbyggja skúlan í Nóatúni byrja longu í 2019.











# Vit tryggja orku til vinnulívið

Við okkara royndum, vitan og førleikum tryggja vit orku til húsarhaldini, stovnar og vinnuna.

Kring landið hava vit bensinsølustøð og Fast-handlar.

Skipini bunkra hjá okkum í best útgjørda terminali í Norðuratlantshavi.

Og hvørja ferð eitt flogfar lyftir seg upp frá vøllinum í Vágum, hevur tað frammanundan tikið brennievni frá okkum.

effo føroya orkufelag

Tel 34 35 00 www.effo.fo

# Føroya Maskinskúli stovnaður í 1965

**Hóast vit ikki fingu ein føroyskan maskinskúla fyrr enn í 1965, bar til at læra til motorpassara og maskinist langt áðrenn tað**

TEKSTUR & MYNDIR:
GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN – PRESS

Føroya Maskinskúli hevur havt eina fjakkandi tilveru síðani stovnanina í 1965. Skúlin hevur hildið til ymsastaðni í høvuðsstaðnum, og seinastu árini hevur hann hildið til við Krákugjógv við Oyggjarvegin.

Í bókini *Føroya Maskinskúli í 40 ár* skrivar høvundurin, Finnur Johansen, millum annað:

*At útbúgva maskinfólk í Føroyum er nógv eldri enn Føroya Maskinskúli. Longu í 1912 og 1913 vóru skeið fyri motorpassarar, og í 1929 fór sjómansskúlin undir skeið fyri motorpassarar, stutt eftir skeið fyri maskinpassarar, og undir seinna heimsbardaga skeið fyri maskinistar.*

Í 1965 varð Føroya Maskinskúli settur á stovn, og hann fór undir virksemi við skeiði fyri maskinistar. Hesir tóku prógv sama heystið. Sambært Finni Johansen hildu nakrir teirra fram við lestrinum til føroyska maskinprógvið, og tað tóku teir í 1966.

*Hvørt hálvár byrjaði nýggjur flokkur lesnaðin. Fyrsta maskinmeistaraskeiðið byrjaði á heysti í 1966, og teir tóku maskinmeistaraprógv á vári í 1968.*

Tað var ikki fyrr enn í 1987, at farið varð undir lesnað til víðkaða maskinmeistaraprógvið, og teir fyrstu tóku prógv í 1988. Í 1987 var farið undir skeið fyri motorpassarar. Fyrstu el-innleggjararnir tóku prógv í 1990, fyrstu kølimontørarnir í 1998 og fyrstu ketilpassararnir í 2001.

Nú er ætlanin so at veita maskinmeistaraútbúgvingini tryggari karmar at virka undir. Tað hendir, um ætlanin hjá leiðsluni á Vinnuháskúlanum at útbyggja Vinnuháskúlan í Nóatúni, soleiðis at pláss bæði verður fyri maskinmonnum og navigatørum undir einari og somu lon, verður førd út í lívið.





# Maskinmeistarafelagið fegnast

**– Stundin er komin, at maskinmeistaraútbúgvingarnar sleppa undan endaleysu fjakkaratilveruni. Tí er ætlanin at fáa allar útbúgvingarnar undir sama tak kærkomin, sigur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, Páll Hansen**

TEKSTUR & MYNDIR:
GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN – PRESS

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum fegnast um ætlanirnar at útbyggja Vinnuháskúlan í Nóatúni. Hann vísir á, at síðan Maskinskúlin byrjaði fyri skjótt mongum árum síðani, hevur hann fjakkað úr einum stað í annað, og tað er ikki haldgott.

– At vit endiliga fáa savnað næmingar, starvsstovur og tøkniliga útgerð á einum og sama stað er frálíkt. Okkum tørvar eina varandi loysn, og hana fáa vit her, sigur Páll Hansen.

## Broytingar fyri framman

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum vísir á, at stórar broytingar eru fyri framman í maskinmeistaraútbúgvingini, og tí er tørvur á góðum og tryggum kørmum.

– Talgildingin fer at halda fram, og alt meira verður automatiserað. Tað setur størri krøv til útbúgvingina, og tí er tað frálíkt at fáa tryggar karmar kring útbúgvingina. Tað verður gott hjá føroyskum maskinmeistarum í framtíðini at kunna siga, at hetta er okkara skúli, heldur Páll Hansen.

Hann sigur seg ongantíð hava skilt, at almennu Føroyar hava rópt okkum fyri eina sjófarandi tjóð, samstundis sum vit bara hava ein skúla til helvtina av yvirmonnunum, nevniliga til navigatørarnar.

– Eg havi mangan hoyrt landsstýris– og tingfólk til prógvhandanir reypað av, hvussu ófør vit eru sum sjófarandi tjóð, men samstundis gloyma tey, at vit ongan skúla hava. So vónandi verður hendan verkætlanin hjá Vinnuháskúlanum sett í verk sum skjótast, sigur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, Páll Hansen.



*Páll Hansen, vinstrumegin, er fegin um ætlanirnar at útbyggja Vinnuháskúlan í Nóatúni, soleiðis at maskinmeistararnir fáa tryggari karmar at virka undir, meðan teir lesa. Høgrumegin situr ein annar av nevndarlimunum í Maskinmeistarafelagnum, Jóan Petur Patursson. Teir fara báðir úr nevndini á komandi aðalfundi. Myndin varð tikin á seinasta blaðfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum og PRESS – við Páll Hansen og Jóan Peturi Patursson sum partar av redaksjónini*



*Ólavur dámar væl at skrúva og manerera og er ikki bangin fyri at fáa olju á fingrarnar. So tá stundir eru til tað, stendur hann til reiðar at fara í maskinrúmið, tá skipini hjá Smyril Line koma á Havnina. Her er hann umborð á Eystnesi*

# Ein spennandi lívsleið

**Nýggi formaðurin í Maskinmeistarafelagnum hevur drúgvar arbeiðsroyndir á bæði landi og sjógvi. Í frítíðini er hann virkin innan ungdómsítróttin hjá HB**

**TEKSTUR:** INGOLF S. OLSEN – PRESS. **MYNDIR:** FOTOSTUDIO/FINNUR JUSTINUSSEN

Hjá teimum flestu er lívsleiðin í stóran mun merkt av tilvild, og soleiðis er eisini hjá 53 ára gamla Ólavi Gunnarsson, sum í næstum tekur við sum formaður í Maskinmeistarafelagnum.

Hann er føddur og uppvaksin á Glyvrum.

– Tá eg var liðugur við realskúlan í skúlanum í Runavík í 1981, hevði eg hug at royna sjólívið, og eg hevði eisini fingið kjans við farmaskipinum Norðlandiu. Treytin var bara, at eg fekk grønt ljós frá mammu, og hon segði bums nei. Har var onki at gera, eg fekk tvey í at velja, annaðhvørt fann eg mær eitt læruplláss, ella skuldi eg á studentaskúla/HF, greiðir Ólavur frá.

At mamman, Kitty Olsen, var so avgjørd hevði sínar orsøkir. Pápi Ólav, Gunnar, var sjómaður og stýrimaður við fiskiskipinum Havørnini, tá hann í 1968 druknaði í Havnini í Esbjerg.

– Tað var tí ikki so løgið, at mamma ræddist sjógvin. Tað hevði eg eisini virðing fyri og hevði ikki hug at gera uppreistur, tá hon segði nei til, at eg skuldi til skips. Eg var kanska eitt sindur firtin í eina viku ella so, men so mátti eg hyggja aðrar leiðir, tí eg slapp heldur ikki at ganga fyri onki, sigur Ólavur.

## Olja heldur enn mjøl

Tað kundi eisini eins væl verið mjøl heldur enn olja, ið hann dálkaði sær fingrarnarl við í gerandisdegnum, tí mamman hevur helst kent medábyrgd fyri, hvør lívsleiðin hjá Ólavi skuldi verða, tá hon so avgjørt hevði sett seg upp ímóti, at hann fór til skips. Í øllum førum skaffaði hon honum eitt lærupláss sum bakari.

Men Ólavur byrjaði ongantíð sum bakaralærlingur, tí 18. august 1981 fór hann í læru á Skála Skipasmiðju.

– Eg misti pápan sum lítil smádrongur, so tað blivu aðrir menn, ið blivu mínar gerandis fyrimyndir. Ein teirra var mammubeiggi mín Nikkil Petur. Hann var sjálvur ólærdur, men hevði handalag sum fáur og arbeiddi í nógv ár á Skála Skipasmiðju og seinni sum maskinmaður á Lynfrost (nú Faroe Origin, red.) í Runavík. So áhugin fyri maskinum og skipasmíði var har, og tað tímdi eg altso betri enn at baka breyð, sigur Ólavur flennandi.



*Framhald á næstu síðu >>*

## Arbeiddi og lærdi í senn

Meðan hann lærdi, arbeiddi hann eisini javnan sum maskinmaður á Bakkafrost. Alifiskur var eisini tá slaktaður, frystur og pakkaður á Bakkafrost, men víðarigóðsking var lítil og ongin. Stórt virksemi var tó við svartkjafti og eisini alifóðri, ið var framleitt úr slógnum frá svartkjaftaframleiðsluni.

– Tað var ógvuliga gevandi, og tá eg sum nýútbúgvin sveinur fekk boðið fast arbeiði sum maskinmaður á Bakkafrost, var eg ikki í iva, og eg havi havt nógv góð ár Bakkafrost, sigur Ólavur.

## Á maskinmeistaraskúla

Hann arbeiddi sum maskinmaður á Bakkafrost í 14 ár, frá 1985 til 1999. Tá byrjaði hann á Maskinmeistaraskúlanum í Havn.

– Í veruleikanum ætlaði eg bara at taka maskinist, men tá eg var komin so langt, gjørdi eg av at halda áfram til maskinmeistara – tá var útbúgvingin stigvís, so tað var ikki neyðugt at taka endaliga avgerð um, hvørt man vildi verða maskinist ella maskinmeistari, áðrenn farið var undir útbúgvingina. Men eg havi so ikki angra, at eg fór allan vegin, sigur Ólavur.

Tá hann var liðugur sum maskinmeistari á sumri 2002, fór hann aftur inn á Bakkafrost at arbeiða, men tað var bara fyri at venda, tí longu seinni sama summar byrjaði hann sum maskinassistentur umborð á gomlu Norrønu. Hann mynstraði sum assistentur, tí hann enn onga siglingstíð hevði til at kunna mynstra sum meistari.

– Tað var í einum brúdleypi, at eg meira og minni í ovfarakæti lovaði meg við Norrønu, men í bakhøvdinum sat eisini ein lítil ræðsla fyri at enda á síðulinjuni fakliga sæð, um eg ikki tordi at royna okkurt nýtt, tí sæð burtur frá lærutíðini hevði eg bara arbeitt á Bakkafrost, sigur Ólavur frá.

## Ferðmikil karriera

Mamman var deyð í 1999, so hesaferð var ongin, sum segði honum bums nei at fara til skips.

Ólavur sigldi so sum assistentur við gomlu Norrønu, til tann nýggja kom í apríl 2003. Síðani sigldi hann eisini sum assistentur við nýggju Norrønu í nakrar mánaðir, til hann í juni 2003 kundi mynstra sum meistari.

Karrieran á sjónum var ferðmikil, tí longu í mars 2008 var Ólavur maskinstjóri á Norrønu, og tað var hann til í mai 2015, tá hann fór í starv sum maskinmeistari á Fossáverkinum hjá SEV í Vestmanna.

– Mær dámdi væl at sigla, og tað passaði eisini væl til heimalívið við konu, børnum og frítíðarítrivi, tí útmynstringin var eitt til eitt. Men eg eri nokkso fríðleysur av lyndi, so eg byrjaði so smátt at kenna gerandisdagin heldur triviellan. Eg vildi fegin royna okkurt nýtt. So tá SEV søkti ein vaktmeistara til Fossáverkið, søkti eg og fekk starvið.

– Men sjálvt um tað starvið er eitt super starv fyri nógvar maskinmeistarar, so sannaði eg ógvuliga skjótt, at tað var tað ikki fyri meg. Eg kendi meg parkeraðan at sita á vakt og bara eygleiða, at alt virkaði, sum tað skuldi. Ikki tí, eg arbeiddi saman við stak fittum fólki á SEV og knýtti nógv góð vinabond, sum enn halda, men starvið var bara ikki til mína náttúru, greiðir Ólavur frá.

## Tekniskur leiðari

So tað bleiv bert til tríggjar mánaðir hjá SEV. Tá hevði Smyril Line aftur boð eftir honum, nú við einum tilboði um at gerast tekniskur leiðari hjá reiðarínum í




*Hóast hann er sera spentur upp á nýggju avbjóðingina, at ganga fremst í stríðnum fyri betri korum og rættindum hjá maskinmeistarunum, so er tað eisini við sorgblídni, at Ólavur Gunnarsson í næstum sigur farvæl við Smyril Line, har hann seinastu trý árini hevur røkt spennandi starvið sum tekniskur leiðari*

sambandi við, at flotin í 2015 varð víðkaður við farmaskipunum Eystnesi og Hvítanesi og síðani eisini Mykinesi í 2016

– Talan var um eitt spennandi, nýskipað starv, sum eg ikki helt, at eg kundi siga nei til. Mær hevur eisini dámt væl at veri við í hesum starvinum, sum er sera avbjóðandi, sigur Ólavur.

Hóast leiðari hevur honum dámt væl at verið við í gerandisarbeiðnum í sambandi við skipini og hevur ikki verið bangin fyri at fáa olju á fingrarnar.

– Jú mær dámar væl at skrúva og manerera, men møguleikarnir fyri tí hava tó verið avmarkaðir. Sum tekniskur leiðari fyri fýra stór skip havi eg skula umboðað reiðaríið á øllum fundum av tekniskum slagi og havt ábyrgdina av øllum tí tekniska samskiftinum, kvalitetstrygging, innkeypi, dokking, umvælingum og so framvegis, so tað sigur seg sjálvt, at har hevur ikki verið nógv avlopstíð, sigur Ólavur.

### Altíð í sving

Hann er heldur ikki av tí slagnum, sum bindir frið, tá hann hevur frí.

– Spyrt tú konuna, so heldur hon ikki, at eg nakrantíð havi sitið niðri í meira enn fimm minuttir. Tað er ikki onki um tað, og eg plagi til dømis at taka ein ordiligan umgang á kondisúkkluni, ímeðan eg hyggi at Degi og Viku, sigur Ólavur flennandi.

Konan eitur Katrin Bjarnadóttir og er pedagogur. Saman eiga tey synirnar Bjarna og Dánial, ið eru ávikavist 15 og 13 ár. Ólavur eigur eisini dóttrina Gunnvá, sum er 25. Hon býr í Danmark og lesur til elektroverkfrøðing.

Ólavur er gamal ítróttarmaður, spældi sum yngri fótbólt í barndómsfelagnum NSÍ, og tá synirnir komu í fótbóltsaldurin, bleiv hann partur av venjaratoyminum hjá HB. Tað er hann enn, hóast fótbóltur ikki longur fyllir so nógv hjá synunum, sum í staðin hava valt sær judo sum fremstu ítróttargrein.



 *Framhald á næstu síðu >>*

## Nýggi formaðurin:

# VIT SKULU VERA MEIRA SJÓNLIG



*Ólavur er bráður, men sera lættur av lyndi og hevur lætt við at samskifta við øll fólk. Eginleikar hann eisini fær brúk fyri, nú hann hevur sett sær fyri at styrkja dialogin við limirnar og vera uppsøkjandi í sínum virki sum formaður í Maskinmeistarafelagnum*

**Maskinmeistarafelagið skal í størri mun vera við til at mynda kjakið og gera sína ávirkan galdandi í øllum málum, sum onkursvegna eru viðkomandi fyri limir felagsins. Tað sigur Ólavur Gunnarsson, sum eftir aðalfundin tekur við sum nýggjur formaður í felagnum. Hann leggur dent á, at Maskinmeistarafelagið er eitt yvirmannafelag, og at sáttmálasamráðingar fram eftir skulu fara fram við hesum fyri eyga. Hetta kann hava við sær, at siðvenjur sum felagssamráðingar við eitt nú Fiskimannafelagið fara í søguna**

**TEKSTUR:** INGOLF S. OLSEN – PRESS. **MYNDIR:** FOTOSTUDIO/FINNUR JUSTINUSSEN

Tað verður ein maður við bæði visjónum og ítøkiligum ætlanum um broytingar, sum setir seg í formanssessin í Maskinmeistarafelagnum eftir aðalfundin 24. mars.

Ólavur Gunnarsson tekur við sum formaður uttan atkvøðugreiðslu, tí hann var tann einasti, sum bjóðaði seg fram, nú Páll Hansen leggur frá sær eftir 11 ár í sessinum.

– Eg havi gjørt mær onkrar tankar um, hvussu eg ætli at virka sum formaður, og eg havi eisini nakrar greiðar hugsanir um broytingar og um at nútímansgera felagið. Millum annað ætli eg at leggja nógva orku í at gera felagið meira sjónligt millum fólk, ikki minst millum limirnar sjálvsagt. Sum formaður skal eg ganga á odda áhaldandi at fáa okkara sjónarmið ament fram og seta dagsskránna í málum, sum onkursvegna eru viðkomandi fyri limir felagsins, sigur hann.

### Hvør sín stíl

Ólavur leggur tó dent á, at hetta ikki skal skiljast soleiðis, at hann heldur Páll hava gjørt ov lítið fyri limirnar.

– Páll hevur gjørt eitt gott arbeiði, og eg taki yvir eitt væl rikið felag. Men hann hevur sín stíl, og eg havi mín. Eg leggi kanska større dent á at virka úteftir enn hann, at vera sjónligur og at vera í støðugum dialogi við limirnar. Tað ætli eg millum annað skal síggjast aftur í regluligum limafundum, eins og eg ætli at fáa skipað eitt meira virki samskifti við at brúka teir sosialu miðlarnar meira, serliga Facebook. Við einum aktivum samskifti ber ofta til at fanga trupulleikarnar í føðingini og loysa teir, áðrenn teir vaksa seg stórar og enda sum eitt mál hjá felagnum, sigur hann.

### Nærri limunum

Ólavur er lættur av lyndi og dámar væl at práta og kjakast um alt, sum fyriferst.

– Tí kundi eg eisini hugsað mær, at tað bleiv meira náttúrligt, at limir komu á gátt í Maskinmeistarafelagnum, tá teir hava



*Ólavur á fyrireikandi fundi við sitandi nevnd í Maskinmeistarafelagnum. Hann kemur beint í eldin sum nýggjur formaður, tí hann skal standa á odda fyri samráðingunum við almennu arbeiðsgevararnar, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Sáttmálarnir gingu út 1. oktober, men felagið hevur bíðað eftir samráðingartørni hjá arbeiðsgevarunum. Sáttmálin við Føroya Reiðarafelag er hinvegin longdur til 1. apríl næsta ár*

okkurt upp á hjarta, ella bara fyri at fáa eitt prát. Tað snýr seg um at minka um fjarstøðuna ímillum limir og felag, sum eg haldi vera í so stóra, sum er.

– Sum meinigur limur havi eg onkuntíð hildið, at felagið er ov anonymt og havi ofta saknað tað aktiva kjakið millum limirnar um øll møgulig mál, sum stinga seg upp. Alt gongur skjótt fyri seg í dag, og tað nyttar onki at goyma øll kjak til aðalfundin, har tað eisini er avmarkað, hvussu nógvir limir møta. Tí má kjak og samskifti vera alla tíðina, og sum formaður má eg eisini melda út og leggja meg út í tað almenna kjakið í teimum málum, har limirnir vænta, at felagið hevur eina meining, sigur Ólavur.

Hann ætlar eisini, at felagið skal verða meira uppsøkjandi og skipa fyri tiltøkum ella limafundum kring landið.

– Sum eitt nýmótans fakfelag eiga vit at kunna um og kjakast um alt, sum er viðkomandi fyri limirnar. Tað kann vera um eftirløn, um arbeiðsheilsu, strongd og so framvegis. Sosiala samveran hevur eisini stóran týdning. Men alt nýtist ikki at vera í Havn, eg ætli sjálvur meira út allastaðni har, sum limirnir eru, sigur komandi formaðurin.

## Trupul mál

Ólavur viðgongur, at tað í summum málum, serliga viðbreknum politiskum málum, kann vera torført hjá felagnum at tala við einari rødd. Men tó er tað umráðandi, at nevndin tekur undir við tí, sum kemur frá felagnum.

– Fiskivinnunýskipanin er eitt dømi um tað. Í slíkum førum er tað týdningarmikið, at tað sum alment kemur frá felagnum ongantíð má gera støðuna verri fyri limirnar. At formaður og nevndarlimir so eisini úttala seg um sínar møguligu serstøður, er ein onnur søk, men tá má dentur verða lagdur á, at talan er um persónligar meiningar, og at úttalilsið tí er fyri egna rokning, sigur Ólavur og leggur afturat:

– Tá felagið í summum málum eftir mínum tykki hevur verið ov anonymt, er tað helst júst eitt úrslit av, at man kanska ikki hevur verið samdur og tískil hevur viljað bundið um heilan fingur við bara onki at siga.

Alt hetta er ikki bara tikið úr leysum lofti, tí Ólavur kennir væl nevndararbeiðið í Maskinmeistarafelagnum innanífrá. Hann sat nevniliga í nevndini í fýra ár frá 2009 til 2013.

– Eg veit væl, hvussu trupult tað kann vera at mynda felagið við einari rødd, og eg skal heldur ikki gera meg betri til tað kynstrið enn øll onnur, sigur hann.

## Ymisk áhugamál

Eisini inneftir í felagnum er ofta neyðugt, at nevndin og ikki minni formaðurin hevur tunguna mitt í munninum. Felagið organiserar jú maskinmeistarar á bæði landi og sjógvi, og tað kemur meira enn so fyri, at áhugamálini stoyta saman.

– Hatta hevur altíð verið ein trupulleiki, um man kann kalla tað tað, í felagnum, tí tradisjonelt hava maskinmeistararnir á landi








*Eftir aðalfundin 24. mars tekur Ólavur Gunnarsson (vm) við formanssessinum í Maskinmeistarafelagnum eftir Páll Hansen (hm), sum hevur verið formaður tey seinastu 11 árini*

havt meiriluta í nevndini. Tí hava teir á sjónum eisini til tíðir hildið, at teir ikki blivu nóg væl hoyrdir. Á sjónum eru limirnir aftur býttir ímillum farmaflotan og fiskiskip, og har eru áhugamálini heldur ikki altíð tey somu. Men tað hevur tó gingið hampuliga væl higartil hjá felagnum at umboða so ymisk starvsøki, og tað fara vit eisini at finna út av frameftir, sigur Ólavur.

Hann heldur tó, at tað kanska hevði verið eitt gott hugskot at broytt viðtøkurnar hjá felagnum soleiðis, at tað bleiv tryggjað, at bæði maskinmeistararnir á landi og maskinmeistararnir á sjónum altíð høvdu umboð í nevndini.

– Í sambandi við eina nýmótansgerð av felagnum, hevði tað kanska eisini verið vert at umhugsa, um felagið skuldi verið skipað í tvær deildir, eina fyri arbeiðsplássini á landi og eina fyri arbeiðsplássini á sjónum. Hetta hevur tó als ikki verið aktuelt í felagnum og er bara ein skjótur tanki frá mínari síðu. Drúgv fyrireiking og grundleggjandi kjak skal til, áðrenn so víttfevndar broytingar verða gjørdar, sigur Ólavur.

## Formansábyrgdin

Viðvíkjandi sáttmálasamráðingum og dagliga stríðnum fyri limirnar, er komandi formaðurin meira avgjørdur um at broyta siðvenju og mannagongdir. Bæði tá tað snýr seg um arbeiðið og uppgávubýtið innanhýsis í felagnum og í arbeiðnum úteftir.

Í dag verða innanhýsis uppgávurnar í sambandi við sáttmálarnar oftast býttar millum nevndarlimirnar, sum hava hvør síni ábyrgdarøki.

– Tað ætli eg at broyta, tí sum formaður haldi eg, at eg eigi at hava høvuðsábyrgdina av sáttmálunum og tí, sum hevur við teir at gera. Formaðurin er fulltíðarsettur og er tí tann, sum hevur best møguleika at hava yvirlit yvir øllum. Hetta skal ikki skiljast soleiðis, at nevndarlimirnir skulu koblast úr dagliga virkseminum. Tvørturímóti fer tað at krevja betri viðgerð av flestu málum í nevndini, og tí má innanhýsis samskiftið har eisini verða meira intensivt, enn tað er í dag, sigur Ólavur.

## Eitt felag fyri yvirmenn

Tá tað kemur til sáttmálar og avtalur á sjónum, ætlar hann eisini grundleggjandi broytingar. Sum er, er siðvenjan, at tey trý manningarfeløgini arbeiða sera tætt saman um at kalla alt og eisini ofta samráðast saman um sáttmálarnar. Hetta samstarvið er í dag skipað í FMU (Faroe Maritime Union).

Men tann leisturin skal eftirmetast, ætlar Ólavur.

– Tað ljóðar so gott og viðeiriligt, at øll trý manningarfeløgini draga eina línu, men henda siðvenjan kann verða eitt haft um beinið hjá Maskinmeistarafelagnum, og eg eri sannførdur um, at hon eisini kann vera eitt haft um beinið hjá Fiskimannafelagnum. Tí á sjónum eru vit burtur av eitt yvirmannafelag, og tað haldi eg, at vit eisini skulu leggja dent á at vera. Vit hava sjáldan somu áhugamál sum Fiskimannafelagið, tvørturímóti kollidera áhugamálini rættiliga ofta. Tá er øðrvísið við Føroya Skipara– og Navigatørfelag, sum eisini er eitt yvirmannafelag, og tí gevur tað nógv betri meining at hava tætt samstarv við tað felagið um sáttmálarnar, staðfestir Ólavur.

Hann leggur tó dent á, at ongin illvilji ímóti Fiskimannafelagnum liggur í hesum, og at hann sjálvsagt framhaldandi vil samstarva við Fiskimannafelagið um felags áhugamál, har tað gevur meining.

– Tað gera vit við øll feløg, men tað kann so vera frá máli til mál, sigur Ólavur.

# 11 maskinmeistarar fingu prógv

**19. januar var prógvhandan á Vinnuháskúlanum. 11 maskinmeistarar, 11 skipsførarar og 15 skiparar fingu prógv hesaferð.**

**TEKSTUR:** INGOLF S. OLSEN – PRESS. **MYNDIR:** ERLAND HENTZE RASMUSSEN

Skálin var sum altíð stúgvandi fullur, tá tað 19. januar var prógvhandan á Vinnuháskúlanum.

11 maskinmeistarar fingu prógv hesaferð.

Wilhelm E. Petersen, skúlastjóri, beyð vælkomin, og gestarøðari hesaferð var Gunvør Balle, forkvinna í mentanarnevndini hjá Tórshavnar býráð.

Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, ynskti vegna felagið til lukku í stuttari røðu. Hann legði dent á nógvu møguleikarnar, ið maskinmeistaraútbúgvingin gevur.

– Her hjá okkum hugsa vit kanska fyrst um siglandi maskinmeistarar við handilsskipi, offshore skipum og pallum og fiskiskipum. Men maskinmeistarar eru eisini lyklapersónar og leiðslupersónar innan nógv týðandi øki í einum samfelag millum annað elverk, vatnverk, fjarhita/brennistøðir og sjúkrahús.

– Men við øllum hesum møguleikum fylgir eisini ábyrgd. Fyri tykkum sjálvum, arbeiðsplássinum, og ikki minst fyri umdøminum hjá føroyingum sum siglandi fólki.

– Tann skjótt vaksandi automatiseringin hevur stóra ávirkan á arbeiðið hjá einum maskinmeistara í dag. Hesin vøksturin innan automatisering og digitalisering ger eisini tað, at brúk verður fyri fleiri dugnaligum maskinmeistarum í framtíðini, segði Páll Hansen millum annað.

Eisini Ólavur Gunnarsson, sum á aðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum 24. mars loysir Páll Hansen av í formanssessinum, segði nøkur orð – hesaferð tó umboðandi sítt arbeiðspláss Smyril Line, har hann er tekniskur leiðari.

– Í dag standi eg her umboðandi Smyril Line. Fyrstu ferð, eg stóð her og helt røðu, var tað vegna maskinmeistaraflokkin, næstu ferð verður tað helst vegna Maskinmeistarafelagið, har eg, um alt lagar seg, sum tað sær út, taki við sum formaður 24. mars.

– Um eg skal geva tykkum eitt ráð á tykkara stóra degi, so er tað, at tit skulu møta komandi avbjóðingum við eyðmýkt, og at tit til eina og hvørja tíð tora at dvølja við avbjóðingina, til tit eru til reiðar at fara víðari. Tykkara tíð á ovastu rók skal nokk koma, um tað er har, tit vilja vera, og tá er umráðandi at vera væl ílatin og fyrireikaður til ta avbjóðingina, segði Ólavur Gunnarsson millum annað.



*Wilhelm E. Petersen, stjóri á Vinnuháskúlanum, beyð vælkomin*



*Ólavur Gunnarsson helt røðu vegna Smyril Line, har hann er tekniskur leiðari. Men fram eftir fer hann at umboða Maskinmeistarafelagið til prógvhandanir – hann tekur við sum formaður í felagnum á aðalfundinum seinni í mánaðinum*



*Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, ynskti vegna felagið næmingunum til lukku við prógvunum*





*Hesir maskinmeistarar fingu prógv (tilvildarlig raðfylgja): Martin Debes Nielsen, Ólavur H. G. Christiansen, Ari Sakarisson, Símun Festirstein Andreasen, Sunnleif Joensen, Hilmar Sveinbjørnsson, Bogi Tróndheim, Dávid Petersen, Fróði Hammer, Dávur Berg og Terji Hammer.*

*Virðislønir: 1. Símun Festirstein Andreasen, grindaknív frá SEV.*
*2. Fróði Hammer, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum.*
*3. Dávur Berg, kikara frá Norðoya Sparikassa.*

*Ídnisvirðisløn: Hilmar Sveinbjørnsson, gullur frá A. P. Møller*



*Sum altíð var Skálin stúgvandi fullur av fólki*

SJÓVINNUSTÝRIÐ



HVØRJUM KUNNU VIT HJÁLPA TÆR VIÐ?

| | |
|---|---|
| SIGLINGARLOYVI | MANNINGARÁSETING |
| SKAÐAFRÁGREIÐINGAR | MYNSTRING |
| SKIPASÝN | SIGLINGARBØKUR |
| FAS | SKIPASKRÁSETING |
| SJÓVINNUBRØV | LOÐSPRÓGV |
| UNDANTAKSLOYVI | 24/7 VAKTTELEFON |

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

www.fma.fo / fma@fma.fo / tel 35 56 00



*Esmar Müller er her avmyndaður heima í køkinum í heimi teirra í Klaksvík. Mynd: Grækaris D. Magnussen*

# Maskinstjóri á Christiani í Grótinum við Logos Hope

**Esmar Müller hevur siglt sum maskinmeistari, síðan hann tók útbúgvingina í 1996. Umframt at hava siglt við nótabátum, hevur hann verið nakrar túrar við Logos Hope, sum er gamla Norrøna. Tað hevur givið honum upplivingar og minnir fyri lívið**

**TEKSTUR:** GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN – PRESS

Hann hevur siglt nógv við nótabátum størsta partin av vaksna lívi sínum, serliga Christiani í Grótinum, og har hevur hann verið ein av maskinstjórunum í mong ár. Hann var við Christiani í Grótinum seinast í 1990-unum, tá velduga framgongdin í føroyska uppsjóvarflotanum byrjaði.

Tíðin hjá Esmari Müller í uppsjóvarfiskiskapinum hevur verið góð, spennandi og lærurík. Men hann hevur eisini upplivað annað og meira í tíð síni sum maskinmaður. Hann hevur nevniliga eisini siglt sum maskinstjóri við trúboðanarskipinum Logos Hope. Hetta er Gamla Norrøna, sum trúboðanarfelagsskapurin OM keypti í 2004. Logos Hope hevur verið í trúboðanartænastu síðan 2009. Nøkur ár eftir tað fór Esmar Müller saman við konu og børnum fyrsta túrin sum maskinstjóri við Logos Hope. Tað gjørdust minnisríkar løtur hjá familjuni.

## Uppvaksin í Klaksvík

Hann er føddur og uppvaksin í Klaksvík. Her traðkaði hann sínar barnaskógvar, her gekk hann í barnaskúla, og her gjørdi hann seg eisini lidnan við framhaldsdeildina. Eftir lokið 10. floks prógv á sumri í 1986, fór hann í februar í 1987 til skips við Raðhamri. Raðhamar var nýggjur tá. Um heystið sama árið fór hann við Christiani í Grótinum sum dekkari og sigldi við honum í eitt ár. Tíðirnar í nótaflotanum vóru vánaligar

*Framhald á næstu síðu >>*

NAVN: Esmar Müller
BÚSTAÐUR: Klaksvík
FØDDUR: 20. august í 1969
PARLAGSSTØÐA: Giftur við Gunnvá
BØRN: Kári,13 ár, Maria, 16 ár og Dánjal, 19 ár
ÚTBÚGVING: Maskinmeistari í 1996
STARV: Maskinstjóri við Christiani í Grótinum



*Esmar hevur í mong ár siglt sum maskinmeistari við Christian í Grótinum. Mynd: Bogi/Jón*

tá, og tí fór Christian í Grótinum til Suðurafrika at fiska fyri at hóra undan.

– Tá fór eg í læru sum maskinsmiður á Klaksvíkar Sleipistøð. Eg var útlærdur sum maskinsmiður í 1992, og tá fór eg beint á maskinskúla í Havn, greiðir Esmar Müller frá.

Í 1996 fór hann so aftur umborð á Christian í Grótinum, tá sum útbúgvin maskinmeistari. Tá teir seinast í desember mánað í 1997 fiskaðu við Marokko, fóru teir á land. Men tá stóð nýggi Christian í Grótinum í gerð.

– Sannleikin var tann, at gamli Christian í Grótinum tá hevði tænt fyri seg, heldur hann.

## Eftir nýggjum skipi

Í januar í 1998 var Esmar Müller teirra millum, sum fóru til Chile eftir nýggja Christiani í Grótinum. Miðskeiðis í mars hetta árið komu teir á Klaksvík við nýggja skipinum, og síðani fóru teir beinanvegin til fiskiskap.

– Tað bragdaði beinanvegin við fiskiskapinum, og tá byrjaði uppsvingið í uppsjóvarfiskiskapinum av álvara. Tá kundu vit fiska svartkjaft alt árið, og vit fóru frá at selja fyri umleið 30 milliónir krónur við gamla Christiani í Grótinum í 1997 til at fiska fyri góðar 60 milliónir krónur í 1998 við nýggja Christiani í Grótinum, og tað var bara í níggju mánaðir, altso frá mars til desember, sigur hann.

Fyrstu tíðina sigldi Esmar Müller mest sum 1. og 2. meistari, men hann gjørdist skjótt maskinstjóri, og síðan hevur hann siglt nógv sum maskinstjóri.

Í 2008 keyptu chilenar Christian í Grótinum aftur frá klaksvíkingum, og Esmar var ein teirra, ið fór við teimum til Chile við skipinum.

– Tað var stuttligt at koma aftur til Chile, tí tað var jú her, vit høvdu verið eftir honum 10 ár frammanundan. Og á bryggjuni stóðu Kristian Martin Rasmussen og familjan og tóku ímóti okkum, tí júst tá var Norðborg smíðað – eisini í Chile. So eg tók klæðnasekkin við mær beint umborð á Norðborg, sigur hann.

Nú sigldi Esmar so við Norðborg árini frá 2009 til 2012. Tá teir í 2013 keyptu núverandi Christian í Grótinum úr Noregi, fór hann umborð á hann. Síðan hevur hann siglt við hesum Christiani í Grótinum. Hetta er verksmiðjuskip, so hann kann til dømis skera sild og makrel og frysta, men hann hevur onga mjølfabrikk.

– Vit fiska svartkjaft nærum helvtina av árinum, og síðan fiska vit sild og makrel um heystið, sigur hann.

## Logos Hope

Í 2008 vóru Esmar og familjan í Danmark og ferðaðust. Tá lá Logos Hope í Køge, og teir høvdu brúk fyri maskinmonnum. Hann varð so spurdur, um hann hevði hug at koma til Køge ein túr at hyggja at gomlu Norrønu.

– Tá frítíðin hjá okkum var liðug, broyttu vit fráferðina úr Danmark við Norrønu, og fóru í staðin til Køge umborð á Logos Hope. Har umborð fingu vit eina lítla fitta íbúð. Her vórðu sambond knýtt, og vit hildu sambondini við líka, greiður hann fra.

Jomfrútúrurin hjá Logos Hope varð gjørdur til Føroya, og meðan skipið lá her, arbeiddi Esmar umborð saman við øðrum føroyskum maskinmonnum. Poul Nolsøe Laksafoss hevði tá fingið savnað nakrar fyrrverandi Norrønu-maskinmeistarar at hjálpa við at umvæla ymiskt í maskinuni.

Á vári í 2010 vóru aftur boð eftir honum. Nú stóð onki til umborð á Norrønu, tí teir manglaðu maskinstjóra. Tað var trupult at fáa menn við pappírum.

– Konan var við uppá at fara umborð á Logos Hope, reiðaríið hjá mær var eisini jaligt, so har var onki annað at gera enn bara at fara umborð, flennir Esmar Müller.

Í oktober hetta árið fóru Esmar, konan Gunnvá, og børnini, Dánjal, Maria og Kári, øll umborð á Logos Hope. Hetta gjørdist teimum ein góð tíð.



*Føroyskir maskinmenn avmyndaðir í maskinrúminum á Logos Hope. Her eru teir staddir í Manila Manila á Filipsoyggjunum. Mynd: Privat*

## Umborð á Malta

Logos Hope lá um hetta mundið í havn á Malta, og har byrjaði hesin túrurin hjá Esmari Müller og familjuni. Vanligt er, at maskinstjórin, sum mynstrar av, avhendar uppgávuna til nýggja maskinstjóran, men soleiðis var ikki í hesum førinum. Maskinstjórin seinastu tíðina var longu mynstraður av og farin heim.

– Tíbetur var ein góður 1. meistari eftir umborð, ein onglendingur. Hevði hann ikki verið eftir umborð, so hevði als ikki borið til, heldur hann.

Eins og tá tey vóru umborð á Logos Hope í Køge á sinni, fingu tey aftur hesaferð eina góða íbúð umborð. Umstøðurnar vóru góðar, og tey trivust væl beinanvegin. Skúli er umborð, so børnini fingu góða skúlagongd.

## Saman við manningini

Maskinstjórar við føroyskum fiskiskipum hava rættiliga lítið pappírsarbeiði. Øðrvísi er umborð á einum skipi sum Logos Hope. Kortini valdi Esmar Müller at niðurraðfesta pappírsarbeiðið so nógv, sum til bar, og valdi heldur at ganga í ketildrakt og arbeiða í maskinrúminum saman við manningini.

Umframt maskinmeistarar hoyra timburmenn, blikksmiðir, rørleggjarar, sveisarar, maskinsmiðir, elektrikarar og nøkur ungfólk, sum læra til tað, tey rópa „watch-keepers", til maskindeildina. Tilsamans var hann leiðari hjá umleið 40 fólkum.

Av tí at Logos Hope er eitt trúboðanarskip, so er tað í hesum arbeiðinum, skip og manning virkar. Bókasølan til dømis er heimsins størsta flótandi bókasøla við yvir 5000 heitum. Nógvar av bókunum hava kristiligt innihald, men har eru eisini rættiliga nógvar aðrar bøkur, millum annað skúlabøkur.

– Bøkurnar eru bíligar, so tað kemur væl við hjá mongum, sum koma umborð, tá vit eru í fátækum londum, og sum annars ikki hava ráð til skúlabøkur, sigur Esmar Müller.

## Vitjaðu Gadaffi í 2010

Síðani Logos Hope byrjaði at virka sum trúboðanarskip, hevur tað verið í mongum av heimsins londum. Vanliga er tað soleiðis, at onkur, sum hevur somikið av ávirkan í heimlandinum, fær tað almenna at bjóða Logos Hope á

*Framhald á næstu síðu >>*



*Her er dóttir Muammar Gaddafi, Ayesha Gaddafi, á veg umborð á Logos Hope. Hon er fremra kvinnan á myndini. Mynd: Privat*

vitjan. Hóast talan eisini er um muslimsk lond, og stjórnirnar væl vita, at Logos Hope umboðar kristnar samkomur, so ber tað eisini til.

– Tá vit so koma í havn, er „opið skip", og vanliga vitja fleiri túsund fólk umborð hjá okkum um dagin. Eitt stórt teatur við plássi fyri 400 fólkum er eisini gjørt umborð, og har eru framførslur av ymsum slag, millum annað tónleikur, sum fólk, ið koma umborð at vitja, kunnu uppliva. So er tað bókasølan, sum hevur alskyns skúlabøkur, og vit mugu ikki gloyma arbeiðið at knýta sambond við fólk, sigur Esmar Müller.

Fyrsti túrurin hjá Esmari og familjuni, tá farið var av Malta, var til Libya og Gadaffi. Áðrenn fráferðina av Malta, vóru fólk úr arabiska heiminum, ella fólk, sum kendu ógvuliga væl til muslimska mentan, umborð og løgdu manningini lag á, hvussu tey skuldu bera seg at og uppføra seg til dømis í Libya. Tað var ein hjálparfelagsskapur, sum dóttir libyska leiðaran, Muammar Gadafi, Ayesha Gadafi, var verji hjá, sum bjóðaði Logos Hope til Libya. Hetta var ein felagsskapur, Watassimo, sum millum annað hjálpti illa støddum børnum, og sum royndi at verja kvinnurættindini.

– Tá vit komu til Tripoli í Libya, stóð hon á bryggjuni og tók ímóti okkum, og har heilsaði eg uppá hana, greiður hann frá.

## Spennandi upplivingar

Ein ST-sendinevnd var í Tripoli júst um tað mundið, sum Logos Hope vitjaði. Ørindini hjá ST-sendinevndini vóru at undirskriva ein sáttmála um verju av børnum og kvinnum. Hendan sendinevndin var eisini millum mongu gestirnar umborð á Logos Hope, og sjálv undirskrivingin fór eisini fram umborð á Logos Hope.

Vitjanin í arabiska heiminum vardi til nýggjárið í 2010, bara hálvan annan mánað áðrenn fyrstu mótmælini móti libysku stjórnini byrjaðu í Benghazi hin 15. februar í 2011. Meðan Logos Hope lá í Libya, vóru ongi tekin til nakran ófrið av nøkrum slag.

– Tað var ógvuliga friðarligt, og blíðskapurin var óførur allastaðni. Felagsskapurin, sum Ayesha Gadafi var verji hjá, skipaði fyri útferðum fyri okkum, og menn, tí tað vóru alt menn, sum umboðaðu felagsskapin úteftir, vóru í heilum umborð og vitjaðu okkum. Stórir bannarar vóru allastaðni at síggja av Muammar Gadafi, men friðarligt var tað. Løgreglan til dømis var ikki vápnað, og tú sást heldur ikki nógv til løgregluna. Seinni fóru vit víðari til havnarbýin Misrata, sum eisini liggur í Libya, og har fekk eg ein vinmann, greiður Esmar Müller frá.

Hann fekk í grundini vinir allastaðni. Tá vitjaninar byrjaðu, gekk hann í maskinmeistarabúna við rípum, og tað dámdi libyska fólkinum.

– Ja, ja, tey vildu sleppa at sita hjá mær, flennir hann.





*Framhald á næstu síðu >>*




*Her er Esmar í essinum – til arbeiðis í maskinrúminum. Mynd: Privat*

– Hevur tú fingið ein arabiskan vin, so er hann vinur tín fyri lívið, leggur hann aftrat.

Tá tey komu til triðja býin við Logos Hope í Libya, Benghazi, var hesin eini libyski vinmaðurin hjá Esmari og tók ímóti teimum. Tá hevði hann koyrt einar 1800 kilometrar úr Tripoli til Benghazi at taka ímóti teimum.

## Í skrellibýnum í Kairo

Hesa ferðina, tey sigldu við Logos Hope, vóru tey eisini í Port Said í Egyptalandi. Býurin liggur við innsiglingina til Suesveitina, og Logos Hope fekk sum vanligt besta plássið í havnini – tætt við miðbýin.

– Her vórðu vit eisini boðin nógvar útferðir, og ein teirra var til sonevnda „Skrellibýin" miðskeiðis í Kairo. Í skrellibýnum búgva eini 40.000 fólk, alt kristnir koptar. Tey kristnu í Egyptalandi hava yvirhøvur ilt við at fáa góð arbeiði, og tað var skrellibýurin eitt gott dømi um. Her liggur annars ein ómetaliga vøkur og serstøk kirkja, ein helliskirkja, sum tað varð rópt. Hetta er ein kirkja, ið er gjørd sum eitt veldugt helli ella amfiteatur inn í landslagið, sigur Esmar Müller.

Úr Egyptalandi fóru tey til Beirut í Libanon. Her vóru tey í einar tríggjar vikur, og her hildu tey jól.

– Í Beirut var blíðskapurin eisini óførur eins og í Libya og í Egyptalandi. Men í Beirut eru so nógv trúarsamfeløg, og her kom eg millum annað at kenna ein kristnan drusa, sigur hann.

Esmar varð avloystur í Beirut, og haðani fóru tey heim.

Seinast hann var umborð á Logos Hope sum maskinstjóri, var seks vikur í februar-mars í 2012. Tá fóru teir 16 maskinmenn og maskinsmiðir úr Føroyum til Manila á Filipsoyggjunum.

– Ta ferðina yvirhálaðu vit ein ljósmotor, umvældu høvuðsmotorin og gjørdu sum heild nógv viðlíkahaldsarbeiði, sigur Esmar Müller.

Hann siglir framvegis sum maskinstjóri við Christiani í Grótinum.



*Føroyingar í Beirut (vit hava bara fornøvnini). Úr vinstru: Jústinus, tannlækni, Atli, uppvaskari, Gudrun, kona tannlæknan, Absalon, maskinmaður, Karina, matarhøllin, Jón, stýrimaður, Símun, bilførari og „altmuligmaður", Anna, gallan/messan, Jósef, maskinmaður, Esmar, maskinstjóri, Gunnvá, kona Esmar, og Dánjal, sonur Esmar og Gunnvu. Mynd: Privat*

# UM M/V LOGOS HOPE

Trúboðanarfelagsskapurin OM keypt í 2004 Logos Hope, sum er gamla Norøna. Í eina tíð lá skipið í Keypmannahavn, men fór síðan á skipasmiðju í Kroatia, har teir umvældu skipið. Umvælingin fór fram frá umleið 2005 til 2009. Logos Hope hevur í dag heimsins størsta flótandi bókasavn, og tað hevur stóran týdning sum skúlaskip hjá ungdómi úr øllum heimsins londum. Vanliga sigla og virka eini 400 fólk úr 50 londum við Logos Hope.

Tá skipið fór í sigling í 2009 vóru umvælingar gjørdar fyri einar 200 milliónir krónur, men lítið var gjørt við maskinuna. Ein nýggjur ljósmotorur og luftskiftisskipan vóru kortini sett í. Seinni er nógv gjørt og umvælt í maskinrúminum.

Góður møguleiki er at røkja andaligu síðuna hjá fólki. Har eru nógvir bíbliulærarar og talarar, og nógvur andaligur sangur er eisini. Til ber bæði at fara umborð sum einstaklingur og sum familja. Talan kann bæði vera um styttri og longri tíðarskeið. Góður skúli er umborð, ein skúli, sum er fyri børn upp í 13-14 ára aldur, og koyrt verður eftir ensku skúlaskipanini.










*Aðalfundurin verður hildin í Østrøm 24. mars.*

# Tríggir hava higartil boðið seg fram sum nevndarlimir

ØSSUR WINTHEREIG – PRESS

Aðalfundurin hjá Maskinmeistarfelagnum verður í Østrøm leygardagin 24. mars.

15. desember var freistin at stilla upp til formann úti, og Ólavur Gunnarsson var einasta valevni, so longu nú er greitt, at hann er nýggjur formaður í felagnum næstu trý árini.

Frá 15. desember hevur eisini verið møguligt at atkvøða fyri nevndarlimum, sum tá høvdu boðað frá, at teir stillaðu upp.

Men til ber eisini at stilla upp til nevndina á sjálvum aðalfundinum.

Higartil eru tríggir maskinmeistarar í uppskoti til teir báðar nevndarsessirnar, sum vera leysir í ár.

Teir tríggir eru Jóhan Mørkøre, Hans Henrik Stenberg og Daniel Nielsen. Kravið til nevndina er, at formaðurin og minst tveir av nevndarlimunum skulu hava staðið maskinmeistaraprógv.

Umleið helvtin av limunum í felagnum eru við fiskiskipum, so vanligt er, at bara helvtin av teimum er heima.

Til ber hjá teimum, sum ikki eru heima á aðalfundinum, at fara inn á skrivstovuna hjá felagnum at atkvøða til aðalfundin ella atkvøða við brævatkvøðu.

Bara virknir limir hava atkvøðurætt á aðalfundinum. Umframt virknar limir eru hvílandi limir, junior-limir og óvirknir limir. Allir limir kunnu møta á aðalfundi.

Fyri at vera virkin limur krevst, at man hevur staðið maskinmeistaraprógv ella maskinistprógv.





# JÓAN PETUR PATURSSON takkar fyr seg



ØSSUR WINTHEREIG – PRESS

Jóan Petur Patursson, sum samanlagt hevur sitið í nevdnini hjá Maskinmeistarafelagnum í 12½ ár, hevur boðað frá, at hann stillar ikki uppaftur.

Jóan Petur Patursson var fyrstu ferð valdur sum eykalimur í mars 2002 og tók sæti í nevndini sama heyst, tá ein nevndarlimur legði frá sær.

Í 2004 stillaði Jóan Petur ikki upp, men var aftur í 2005 valdur sum eykalimur og kom í nevndina í 2007, har hann hevur sitið síðani – samanlagt 12½ ár.

Jóan Petur Patursson hevur verið við til allar sáttmálasamráðingar síðani og hevur verið ein av talknúsarunum hjá felagnum, tá samráðingar hava verið.

Eitt annað av hansara stóru áhugamálum hevur verið at fáa pensjónsskipanina upp á pláss.

– Eftir so nógv ár haldi eg, at tíð er at gira niður, sigur Jóan Petur Patursson.

Jóan Petur arbeiðir hjá MEST, har hann stendur fyri innkeypi og goymsluni.



Kirstin Christiansen er komin á skrivstovuna hjá Maskinmeistarafelagnum at avloysa, nú Eydna Bernhardson er í sjúkrafarloyvi.

Mynd: Grækaris Djurhuus Magnussen



## *FØÐINGARDAGAR Maskinmeistarafelagið:*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Asmund Dahl | Tórshavn | 2/3-1948 | 70 ár |
| Jóan Petur Patursson | Kirkjubøur | 12/3-1958 | 60 ár |
| Birgir Syderbø | Tórshavn | 20/3-1958 | 60 ár |
| Gudmar Joensen | Signabøur | 27/4-1958 | 60 ár |
| Ivan Weihe | Hósvík | 7/3-1968 | 50 ár |
| Steffan Kunoy | Tórshavn | 31/3-1968 | 50 ár |
| Jákup av Kák | Sandur | 16/4-1968 | 50 ár |
| Bárður Magnusson | Miðvágur | 14/3-1978 | 40 ár |
| Rúni Joensen | Sørvágur | 18/4-1978 | 40 ár |
| Jákup Andreassen | Runavík | 12/3-1988 | 30 ár |








# Frá Maskinmeistarafelagnum

**10-11-2017. MF.**
Nevndarfundur. Kunnað varð um fund hjá Landsfelag Pensjónista, sum MF er boðið við til. Kunnað varð eisini um broytingar innan Trygdargrunnin. Tosað varð um skrivligt svar til hoyringar um pensjónsnýskipan. Eisini vóru komandi sáttmálasamráðingar uppi at venda, og støðan, nú verkfall er hjá sjúkrarøktarfrøðingunum.

**24 11-2017. MF.**
Nevndarfundur. Fimm mál vóru á skránni, millum annað Løgtingsmál nr. 36/2017– Uppskot til løgtingslóg um veiðugjald. Málið snúði seg um, hvussu tilfeingisgjald skal roknast. Ætlanin er at gera ein roknihátt, har gjaldið verður stillað automatiskt, uttan at landsstýrismaðurin ásetur tað. Semja var um, at hetta er ein gongd leið. Tosað varð eisini um sáttmálauppleggið til FMR. Semja var um at endurskoða tað.

**27-11-2017. MF.**
Nevndarfundur, FMU. Á fundinum varð støðan um útlendingar í FAS umrødd, nú tað er komið fram, at føroyskt felag ætlar at flagga út orsakað av manglandi seravtalum við ITF um hendan spurning. Her vóru feløgini ósamd, og tað er harmiligt og er samstundis ein keðilig støða. MF hevur allar sínar avtalur á hesum øki ílagi.

**11-12-2017. LÍV.**
Fundur um endurskoðan av avtaluni við LÍV um pensjónssáttmálan. Her gera vit avtalu saman við FSN.

**18-12-2017. MF.**
Tosað varð um nýggju avtaluna við Lív. Hon varð undirskrivað dagin eftir. Uppleggið til FMR varð enn einaferð uppi at venda, og semja var um at gera nýggja lønartalvu til alment sett á landi. Dagfestingin til aðalfundin varð ásett. Semja var um at mótmæla hóttandi útsøgn frá stjóranum í Almannaverkinum.

**02-01-2018. Føroya Reiðarafelag.**
MF og FSN høvdu fund við Reiðarafelagið og umboð fyri JFK. Fundurin snúði seg um at fáa eina avtalu við JFK, nú Borgarin og Norðingur skulu fiska kvotuna hjá partrolarunum hjá JFK.

**05-01-2018. MF.**
Nevndarfundur. Trý mál á skránni. Tosað varð um sáttmálauppleggið við KAF, og komandi samráðingar við Polar Seafood, sum vera í Ålborg. Broyting av eftirlønarprosentinum, fiskiskip.

**09-01-2018. Smæran.**
31 fakfeløg vóru møtt til hendan fundin, nú verkfallið hjá námsfrøðingunum gongur á fimtu viku. 21 av hesum feløgum vórðu samd um at fara í 24 tímar stuðulsverkfall hin 15-01-2018.

**18-01-2018. MF.**
Nevndarfundur, nú tvey feløg hava gjørt sáttmála við FMA og verkfall eisini hava verið. Gjørt onkrar smávegis broytingar í uppskotinum.

**19-01-2018.**
Prógvhandan á Vinnuháskúlanum. Fitt av fólki vóru komin saman at luttaka í prógvhandanini á skúlanum. Stjórin bjóðaði vælkomin og helt eisini eina røðu fyri prógvtakarunum. Gunnvør Balle, forkvinna í mentamáladeild Tórshavnar býráðs, var gestarøðari. Hugnaligur og góður stemningur.

**29-01-2018. Aalborg.**
Fundur um endurnýggjan av avtaluni millum Maskinmeistarafelagið og Polar Seafood.
Maskinmeistafelagið hevði sent síni krøv til broytingar frammanundan, og hevði skrivað hetta inn í verandi sáttmála. Polar Seafood Greenland A/S hevði eingi krøv um broytingar. Polar Seafood segði seg ikki kunna ganga við til broytingar viðvíkjandi eykapørtum so leingi, sum hetta ikki er broytt í sáttmálanum við Føroya Reiðarafelag. So skjótt, sum hetta er broytt í føroyska sáttmálanum, vil Polar Seafood Trawl eisini lata hetta galda fyri hendan sáttmálan.
Semja var um at hækka garantihýruna nakað. Samstundis verður Polar Nanoq nevnt í sáttmálanum.

Á fundinum var annars tosað um støðuna í Grønlandi viðvíkjandi ætlanunum um restriksjónir fyri fremmanda manning. Polar Seafood visti ikki nóg nýtt at siga um hetta, men teir fylgja gongdini og royna at greiða politikarunum frá teirra tørvi eftir kvalifiseraðum fólki.

**02-02-2018. SVS.**
Kunnandi fundur um uppskot til løgtingslóg ILO 188, sum skal setast í gildi fyri fiskiskip. Eisini varð tosað um nýggju mynstringarlógina, sum kemur at vera elektronisk í framtíðini.




# Nýggjur sáttmáli millum Maskinmeistarafelagið og LÍV merkir enn hægri veiting og lægri kostnað

Kundin eigur LÍV. Vinningurin verður borin aftur gjøgnum góðar tryggingar, lágan rakstrarkostnað og eitt munagott avkast á pensjónsuppsparingini.

Kopargøta 1, Tórshavn | **www.liv.fo**